Neistin-H71 23-34 (10-15):

# H71 koyrir bara á

**Enn einaferð lagaðu úrslitini seg til fyrimun fyri oddaliðið. Og enn einaferð gjørdu hoyvíkingarnir sína skyldu**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hondbóltsfepurin í Hoyvík fekk enn kvink upp eftir um vikuskiftið. Leygardagin var H71 í høllini í Hálsi, har botnliðið úr Neistanum ikki fekk gjørt stóvegis við alt sjónligari FM-ætlanirnar hjá H71.

**Skjót avgreiðsla**

Tað var skjótt, at hoyvíkingarnir settu seg á dystin sunnudagin. Neistin fekk spælt við í lítla løtu, áðrenn ferð varð sett á, og tá kom munurin millum liðini veruliga til sjóndar. Í álopspartinum var skotstyrkin hjá H71 nakað nógv størri, enn er hjá flestu av hinum liðunum. Og í verjuni er talan eisini um stórar menn. Somikið stórar, at unga Neista-liðið sjáldan fekk sett seg ígjøgnum á nakran sum helst hátt.

Seinna hálvleiki fór sorlið av álvara at lúra, tá H71 fyrsta korterið vann seg upp á 25-14. Orkan og hugurin til áhaldandi at trýsta mótstøðuna í botn var tó ikki nóg stór, og seinastu løtuna slapp Neistin so aftur at fylgja við, uttan at hetta tó nervaði útfallið av dystinum.

**Liggja væl**

Við sigrinum lyfti H71 seg leygardagin trý stig fram um næstu liðini á talvuni, og tann munurin stóð við eftir dystirnar sunnudagin.

Tí er einki at ivast í, at hvíta høvuðsstaðarfelagið nú er stórfavorittur at vinna sær annað av plássunum í FM-finaluni. Men samstundis ásanna tey í Hoyvík, at arbeiðið enn er so langt ífrá liðugt. Komandi vikuskiftið hevur liðið frí, men eftir hetta verður talan um tveir dystir, sum væl kunnu staðfesta, hvørt felagið nú á 25. ári loksins kann trína á ovastu tindarnar í føroyskum manshondbólti. Kyndil á Hálsi og VÍF í Hoyvík eru dystirnir, sum av alvara skulu prógva, hvussu knoturnar eru í hovyíkingunum.

## FAKTA UM DYSTIN

**Neistin-H71 23-34 (10-15)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Trondur Kragesteen 5(1), Blagoje Buha 4, Kári Horn 4, Carl Herup Olsen 3, Jens Mohr 2, Birgir Poulsen 2, Karl Oddmar Rasmussen 2, Jóhan Brekkstein 1
**H71:** Piti Negru 8, Halgir Dahl Olesen 5(1), Bjarni Sørensen 4, Tróndur Vatnhamar 4(2), Johnny Durhuus 3, Jakob Jónsson 2, Janus Sørensen 1, Poul Kjartan Dam 1, Olaf Vesturgarð 1
**Brotskøst:** Neistin 2, H71 4
**Útvísingar:** Neistin 6, H71 3
**Dómarar:** Hartvig Joensen & Kristian Johansen.



*Teir royndu við øllum lokabrøgdum, men Neistamenninir fingu kortini ikki steðga sigursmaskinuni hjá H71 leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kyndil-KÍF 31-23 (15-12):

# Kyndil spælir eisini við

**Talan varð um tryggan sigur, tá Kyndil hevði vitjan av KÍF sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kollfirðingar fingu ongan tíð loyvi at hava argandi leiklutin, sum teir javnan hava móti ovaru liðunum í deildini.

Kyndilsmenn vistu, at her vóru eingi ráð at kiksa, og frá fyrsta bríksli settu teir seg á dystin. Sum minuttirnir gingu tóktist talan veruliga at skula gerast um sorl, men tíbetur fyri kollfirðingarnar gjørdist tað tó ikki heilt so galið.

Ikki minst hevði Kyndil ein góðan dag í verjuni, har lunnar vórðu lagdir undir hópin av skjótálopum. Hesi geva ofta eyka luftina, sum er neyðug ígjøgnum ein dyst, og ivaleyst kundu teir grønu eisini hugsað sær, at hesi framhaldandi fara at koma í næstu dystunum.

Fyribils má Kyndil tó sláa seg til tols við einum frívikuskifti, nú teir ikki eru partur av steypafinaluni í hondbólti. Men skulu vónirnar um finalupláss í FM-stríðnum haldast við líka, er neyðugt at seta fulla ferð á ketlarnar nú. Í so máta mundu teir grønu eisini frøast um, at liðið nú aftur tykist hava funnið góða stevið frá grundspælinum fram. Ábendingar vóru um hetta í Vestmanna fyri viku síðani, men ta ferðina vóru spælararnir tó ikki nóg kaldir at taka møguleikan, tá hesin beyðst. Men við heimadystum móti øllum teimum ovastu liðunum eftir á skránni, hevur Kyndil kanska eisini nakað at halda høgu FM-vónunum í.

## FAKTA UM DYSTIN

**Kyndil-KÍF 31-23 (15-12)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Ragnar Stakksund 8, Høgni Klein 7(2), Hans Áki Dal Christiansen 7(1), Marius Joensen 6, Rókur Akralíð 2, Regin Fossaberg 1
**KÍF:** Damir Oros 11(1), Rógvi Weihe 4, Mirco Milenkovic 3, Petur Martin Poulsen 3, Karl Jóhan Djurhuus 1, Sune Davidsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, KÍF 1
**Útvísingar:** Kyndil 2, KÍF 2
**Dómarar:** Hallur Danielsen & Petur S. Dahl

Lesið Sosialin

Kyndil-Stjørnan 21-28 (9-14):

# Stjørnan trygt móti oddinum

**Tað var so sum so við spenninginum, tá Stjørnan vitjaði hjá Kyndli sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Meðan Stjørnan verður mett sum sterkasta liðið í FM-dystinum hjá kvinnum, verður Kyndil mett sum veikasta liðið í ovara endaspælinum. Tí var kanska heldur ikki væntandi, at Kyndil skuldi gera tað heilt stóra við Stjørnuna, tá dysturin teirra millum var á skránni sunnudagin. Heldur ikki hóast Kyndil var einasta liðið, sum megnaði at taka stig frá Stjørnuni í grundspælinum.

**Sorlið lúrdi**

Og talan gjørdist eisini um tryggan sigur til Stjørnuna. Hóast tær sjáldan settu ferðina upp móti hámarkinum, so høvdu tær alla tíðina tamarhald á dystinum, har tær grønu fyri tað nógvu vóru statistar, at kalla.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki tóktist talan eisini skula gerast um veruliga stórsigur, tá Stjørnan leyp upp á 19-9, men so galið gjørdist tað kortini ikki hjá Kyndli. Stjørnan setti ferðina longur niður, og so kundi Kyndil aftur spæla við seinastu 20 minuttirnar, uttan at dysturin av teirri orsøk gjørdist meira spennandi.

**Eru á odda**

Við sigrinum vann Stjørnan seg akkurát upp á oddasessin í endaspælinum. Bæði stig og málmunur eru ájøvn tí hjá Neistanum, men Stjørnan hevur skotið fleiri mál enn bláa havnarliðið.

Hartil skal ikki gloymast, at Stjørnan eisini hevur heimadystin móti Neistanum eftir, og lítið er at ivast í, at tær síggja hetta sum avgerandi møguleikan at staðfesta, hvør skal standa ovast, tá farið verður undir hálvfinalurnar.

## FAKTA UM DYSTIN

**Kyndil-Stjørnan 21-28 (9-14)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Lina Andriulyte 6(1), Anja Heinadóttir 4, Jórun S. Ludvig 3, Súsanna Petersen 2, Linda Weihe 2, Randi S. Wardum 2, Barbara Egilstrøð 1, Ronja M. Mikkelsen 1, Hildur Høghamar 1
**Stjørnan:** Alina Olaru 9(3), Una Olsen 7(1), Katarina Stepanov 4, Anna Kristina Samson 3, Bára S. Klakstein 2, Joan M. Djordjevic 2(1), Louisa Andreasen 1
**Brotskøst:** Kyndil 2, Stjørnan 6
**Útvísingar:** Kyndil 1, Stjørnan 1
**Dómarar:** Hallur Danielsen & Petur S. Dahl